## Renna á Skálatrøð

Fríggjadagin 27. juli skipar Bragdið fyri rennikapping á Skálatrøð, har kappast verður í fleiri aldursbólkum hjá bæði vaksnum og børnum. Byrjað verður klokkan 18.30, tá tey vaksnu renna 5 kilometrar. Runnið verður nakrar ferðir á einum teini, sum er frá Skálatrøð og út á bakka. Børnini byrja at renna klokkan 19, tá yngstu rennararnir fara ígongd. Tey trý fremstu í hvørjum aldursbólki fáa heiðursmerki. Tilmelding til tiltakið fer fram a www.renn.fo



## Kasta um FM

Bragdið skipar leygardagin fyri FM í olympisku kastigreinununum. Hesar eru spjótkast, hamarkast, diskuskast og kúlustoyt. Kappast verðr á kastivøllinum við Eysturskúlan í Havn, og verður byrjað klokkan 14. Fyrsta kappingin er spjótkast, og síðani koma hamarkast, diskuskast og kúlustoyt. Øll, sum eru limir í FÍF og eru fylt 15 ár kappingardagin kunnu luttaka Tilmelding til kappingina fer fram hjá Hera Ziska, hziska@athletics.fo

# Byrja at súkkla í dag



*Umframt tveir einkultstartir, so verður talan um harðar teinar, tá súkklast skal í Eystur-, Suður- og Streymoynni*

**Í dag verður farið undir stóru súkklukappingina kring Føroyar. Fyrsti teinurin er í Klaksvík, har einkultstartur er á skránni**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er Tórshavnar Súkklufelag, sum skipar fyri kappingini, sum er einasta etapukappingin her á landi. At talan er um etapukapping merkir eisini, at kappast verður um fleiri heiti. Bæði um bláu føraratroyggjuna, ið fremsti súkklarin í kappingini ber, og um fjallatroyggjuna.

Fyrsti teinurin, sum verður súkklaðir í dag, er ein einkultstartur upp á 8 kilometrar. Hesin byrjar og endar á Statoilstøðini í Klaksvík, haðani súkklað verður til Haraldssund og aftur.

Hinir teinarnir, sum skulu súkklast, eru:
**Eysturoy (105 km):** Oyri – Norðskála - Ljósárir – Eiðisskarð – Funningur – Funningsbotn –Oyndafjørður– Skálabotn - undir Gøtueiði – Gøta - Leirvík – Gøta – Runavík – Toftir - runt Agnið - Statoilstøðin á Saltangará
**Sandoy (22 km einkultst):** Statoilstøðin, um brúnna á Sandafløttinum, Traðadalur, Statoilstøðin.
Suðuroy (77 km): Tvøroyri – Øravík – Fámjin – Øravík – Hov – Porkeri – Vág – Lopra – Sumba, um Hestin, Sumba, Vágur.
**Streymoy (120 km):** Tjørnuvík – Saksun - Sundalagið – Kollafjørður – Oyggjarvegin – Tórshavn – Ringvegur – Gomlu rætt – Tórshavn –Áargeil – Gundadalsvegnum – R.C. Effersøesgøtu – vestara Ringvegi – Áargeil – Gundadalsvegur. Teinurin í Tórshavn verður súkklaður 4,5 ferðir.

Tilsamans eru 18 súkklarar teknaðir til kappingina. Teirra millum er vinnarin frá í fjør, íslendski Hafsteinn Ægir Geirsson, sum sjálvandi ætlar sær at verja heitið.

# Gongst væl í Aberdeen

**Føroysku U-landsliðini, sum í hesum døgum eru í Aberdeen, hava higartil vunnið allar sínar dystir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Liðini, sum taka lut í kappingini, eru U15 og U17 hjá dreingjum, og U17 hjá kvinnum.

U15 dreingirnir spældu móti Fraserburgh BC í sínum fyrsta dysti, og hesin endaði við tryggum føroyskum sigri. Úrslitið gjørdist 4-0, og skutu Rógvi Høgnesen og Gilli Sørensen tvey mál hvør fyri Føroyar. Næsta dystin varð spælt móti Hetlandi, og her



*Føroysku genturnar høvdu nú ikki nakra serliga orsøk at smæðst, eftir at tær vunnu fyrsta dystin 6-0*
*Mynd: www.football.fo*

gjørdist talan um sannan stórsigur. Ikki minni enn 9-0. Málini skutu Rógvi Høgnesen(3),Tóki Brattalíð (2), Bogi Petersen, Gilli Sørensen, Ari Ellingsgaard og Ísak Simonsen.

Kvinnurnar spældu sín fyrsta dysti móti Vareneset Ballklub, og vunnu tær ikki minni enn 6-0. Føroysku málskjúttarnir í dystinum vóri Mona Breckmann, sum skeyt tvey mál, og Fríðrunn Danielsen, Steintóra Joensen, Bára Berthelsen og Ása Klakstein.

U17 liðið spældi týsdagin sín næsta dyst í kappingini. Fyrra dystin vunnu teir 4-1 móti Westdyke úr Aberdeen. Málini í tí dystinum skutu Bjarti Mortensen, Hanus Hansen, Johan Símun Edmundsson og Vilhjálmur Davidsen.

Næsti dysturin var móti Dyce BC, ið somuleiðis er úr Aberdeen, og hendan dystin vunnu okkara menn 2-0. Bæði málini vórðu skotin tíðliga í dystinum, og vóru tað Jógvan Rói Davidsen og Hans Mortensen, sum stóðu fyri hesum.


## Arbeiðsmaður ella handverkari til lendisdeildina

Søkt verður eftir fólki til Viðalundina í Gundadali. Arbeiðið er sera sjálvstøðugt við ymiskum uppgávum.

**Førleikakrøv**
Fólk við viðkomandi útbúgving verða tikin framum. Serliga eru anleggsgartnarar og skógararbeiðarar vælkomnir.

**Persónligir eginleikar**
Evnir at arbeiða sjálvstøðugt og at skapa uppgávur sjálvur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt fulltíðarstarv. Lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jógvan Olsen, røktarleiðara, tlf. 30 20 10 ella fartlf. 27 36 80

**Umsókn**
Stutt, skrivlig umsókn skal vera
**Tórshavnar kommunu,**
**Postsmogu 32,**
**FO-110 Tórshavn,**
í hendi í seinasta lagi 20. august.

Umsókn kann eisini sendast sum teldupostur til torshavn@torshavn.fo.
Viðmerk á umsóknina "starv í lendisdeildini".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



TEAM85